Facts um gamla Føroya Banka

Frágreiðingin frá nevndini til kanning av partabrævaumbýtinum í 1993 hevur givið tilfar til føroysku loftfjølmiðlarnar sum neyvan nøkur onnur hending her heima nakrantíð. Miðlarnir hava havt og hava heilan hóp av sínum manningum tvassandi niðri í Keypmannahavn. Um vikuskiftið og síðan eru allar tíðindasendingar farnar til umbýti. Og so hevur verið ein hópur av eykasendingum um sama evni. Fjølmiðlarnir hava tráspurt ekspertar á nógvum økjum og fingið eina ørgrynni av viðhvørt mótsigandi meiningum. Summir av ekspertunum hava havt eina meining um morgunin, eina aðra um kvøldið ella dagin eftir.

Man kann fýlast á, at fjølmiðlarnir hava bert fokuserað á partabrævaskandaluna, tá Den Danske Bank við ósannindum fekk lumpað landsstýrið at taka ímóti eini rúgvu av virðileysum partabrøvum í gamla Føroya Banka. Hetta umbýtið var bert, fyribils, endabresturin av vitleysum atgerðum, almennum og privatum, upp gjøgnum áttatiárini, og fyri tær almennu heilt aftur í sjeytiárini, aftan á at generatiónsskifti á politiska vígvøllinum var farið fram her heima. Teir solidu og skilagóðu menninir vóru farnir úr aktivum politikki fyrst í sjeytiárunum, og teim fáu, sum eftir vóru, lurtaðu nýggju buldribassarnir ikki eftir.

Skal loyva mær at tríva í ella draga fram okkurt av tí, sum førdi til krassjið og tær stóru skuldbindingarnar, ið fylgdu í kjalarvørrinum. Var knýttur at góða, gamla Føroya Banka í 16 ár frá 1970. Veit tí eitt sindur um gongdina, fyri ikki at siga fadesurnar, tey árini og eisini seinri.

Grannskoðara-starvið

Tað var á aðalfundinum í 1970, at eg fyrstu ferð varð valdur grannskoðari í Føroya Banka. Eg hevði tá í fleiri ár selt saltfiskin hjá nøkrum stállínubátum og trolarum. Í tí sambandinum hevði eg fingið mær skrivstovu á ovastu hædd í bankahúsunum í Niels Finsensgøtu. Kom rættiliga ofta niður í bankaavgreiðsluna, serliga við útflutningsskjølum, men eisini í øðrum ørindum.

Her kann viðmerkjast, at stjórarnir báðir sum oftast sótu við borð aftast í avgreiðsluhølinum.

Einaferð eg var har niðri, tað hevur annaðhvørt verið seinast í 1969 ella fyrst í nýggja árinum, bað stjórin meg koma inn á skrivstovu sína. Komin innum spurdi hann, um eg vildi lata meg velja til grannskoðara í bankanum á komandi aðalfundi. Tað kom mær heldur dátt við. Takkaði sjálvandi fyri tilboðið. Svarið var klárt og greitt, at tað vildi eg ikki. Eg segði honum eisini hví. Fyrst tí at grannskoðaraarbeiðið so avgjørt hevði ikki mín áhuga. Eisini og helst tí, at eg hevði nokk at takast við (var limur í Búskaparráðnum, var reiðari á onkrum skipi, og harafturat, sum nevnt, fekst eg við at selja saltfisk). Vit skiltust, og roknaði eg við ikki at hoyra meira um málið. Stjórin gavst tó ikki á hondum, men vendi nakrar ferðir aftur til grannskoðaraspurningin. Mítt svar var hvørja ferð tað sama, at hann mátti royna at finna onkran annan.

So ein dagin beint undan aðalfundinum, eina viku ella minni áðrenn, kemur bankastjórin upp til mín á ovastu hædd. Vit tosaðu um leyst og fast, um fiskivinnuna, prísútlitið, skiparakstur, bankaproblematikk og mangt annað. Í tí hann ger seg til at fara, kemur hann til tað, ørindini í veruleikanum snúði seg um, nevniliga grannskoðarajobbið. Eg ilskaðist eitt sindur og vildi hava at vita, hví hann var so altráur eftir at fáa meg í starvið. Hansara svar var, at hann vildi sleppa av við hann, sum hevði starvið. Harafturat segði hann seg vilja hava ein avloysara, sum hevði hollan kunnleika um føroyskt vinnulív og føroysk samfelagsviðurskifti yvirhøvur. Eg havi helst onkuntíð nevnt sum undanførslu, at eg tímdi ikki at leita eftir eittoyrum. Var tað helst tí, hann legði aftur at, at eksterni grannskoðarin skuldi ikki leita eftir smápengum, ikki ein gang eftir stórum upphæddum. Uppgávan var at meta um engagementini, rætt og slætt. Hann endaði samrøðuna við at siga, at hansara hurð stóð altíð opin, um eg hevði nakað at tosa um.

Aftan á tær mongu áheitanirnar og serliga aftan á seinastu samtaluna var eg farin at ivast, um eg kortini ikki skuldi taka av. Í fyrsta lagi, tí at eg eftirhondini hevði fingið varhugan av, at arbeiðið helst var meira áhugavert, enn eg hevði hildið. Serliga tiltalaði lovaði dialogurin meg. Í øðrum lagi dámdi mær stjóran væl. Í triðja lagi dámdi mær hin stjóran so avbera væl. Í fjórða lagi helt eg meg hava lagt til merkis, at Føroya Banki var eitt sera gott arbeiðspláss. Lovaði at geva svar dagin eftir. Eg tók av.

Eg vil her nevna tveir stjórar við navni. Knud Petersen, sum fekk meg at átaka mær grannskoðarastarvið, var her í umleið fimm ár, og eftirmannin Agnar Hansen, sum eisini var her í eini fimm ár. Báðir vóru teir dugandi bankamenn. Tá AH fór, beint aftaná at bankin fylti 75 ár, var tað ein stak væl konsolideraður banki, hann læt upp í hendurnar á avloysaranum, sum eftir míni meting kom at verða ein katastrofa fyri bankan og landið alt.

Figgjarligu brotasjógvarnir

Avloysarin, sum Den Danske Bank í 1981 sendi at stjórna Føroya Banka, kom at roynast bankanum og landi okkara ein dýrur drongur. Hann kom úr starvsfólkadeildini, har ein Knud Sørensen, núverandi stjóri í DDB, var bossur. Allir stjórarnir í gamla Føroya Banka, líka frá stovnanini til endabrestin, komu úr Den Danske Bank. Eftir styttri áramál fóru teir aftur í starv hjá danska bankanum. Teir vóru útlætnir. Hví menninir við Holmens Kanal eftir 75 ár at hava sent dugnaligar bankamenn funnu uppá at senda ein, sum av berum kleyvarskapi beindi fyri FB, er ilt at skilja. Sjálvt um moralurin í DDB er meira enn klodduttur, hava teir væl ikki sent okkum mannin til at kollsigla stovnin? Ella var tað av líkasælu? Eg dugi ikki at meta um.

Undir øllum umstøðum var tað ein beistagerð! Hann megnaði ikki bert at søpla burtur alt, sum varð bygt upp í tríggjaðingsøld, men gjørdi tað harafturat neyðugt at lata bankanum 1,5 milliard fyri at bjarga honum undan húsagangi. Meginparturin lán, sum føroyski skattaborgarin í dag knógvar undir. Syndarin slapp snikkaleysur!

Tað er ofta sagt, og av røttum, at bankarnir í áttatiárunum hjálpti mongum manni at misbrúka rentuskattaskipanina. Fyrst við valutalánum, sum viðskiftafólk tóku og síðan settu inn í bankan at renta. Dømir kunnu nevnast. Seinri, aftan á 1984 ella um tað mundið, tá rentan í Danmark fall munandi, og obligatiónslán úr kredittfeløgum blivu nógv bíligari og løtt at fáa hendur á, gjørdust tey spekulatiónsobjektini hjá bankunum. Teir hjálptu monnum við einum stórum láni fyri og øðrum eftir. Við bankagarantii flutti lántakarin peningin heim og setti hann í bankan, har hann stóð til fulla rentu, til fløgan einaferð var liðugtgjørd, oftast eini tvey ár ella væl meira aftaná, at lántransaktiónin var farin fram. Í Føroya Banka táttaði posturin garanti í fleiri ár sterkt í 2 milliardir. Peningur streymaði inn. Balansin vaks á hvørjum ári. Men peningurin skuldi so oder so lænast útaftur.

Mangan hoyrdist um fólk, sum fóru inn í bankan at læna kanska eina fjórðings millión ella so, og komu útaftur við eini skuld uppá eina heila ella meir. Var peningurin lántur til húsabygging, varð øll milliónin brúkt til størri og dýrari hús enn ætlað. Hvussu gekst mongum av hesum stakkalum, vita vit alt um. Eisini hava vit hoyrt um menn, sum vildu læna fáar ella fleiri milliónir, og sum vórðu so undirdíktir í likviditeti, at teir investeraðu seg á bláman. Boomurin seinra partin av áttatiárunum, sum var so katastrofalur, so lemjandi, so oyðandi fyri føroyskan búskap, stavaði fyri ein stóran part frá hesum lánum. Føðihjálpararnir vóru bankarnir, ikki minst Føroya Banki. Ein stórur tapari var fiskivinnan, serliga flakavinnan, eksportvinnan, sum ikki orkaði at konkurrera við byggivinnuna um arbeiðskraftina. Danir hava sagt uppaftur í saman, at vit føroyingar hava sjálvir skuldina av stóru uttanlandsskuldina. Hetta er ikki allur sann-



Sofus Olsen gjørdist grannskoðari í Føroya Banka á aðalfundinum í 1970 og røkti starvið í 16 ár



– Tað, sum her er drigið fram, er sjálvandi bert partur, kanska lítil, av tí, ið frá føroyskari síðu kundi verið skrivað um bankapolitikkin í Føroyum upp gjøgnum áttatiárini og kollapsið seinast í 1992 og í 1993, sigur Sofus Olsen